**Skúlastýrisfundur**

Dagfesting: 01.05.2019
Kl: 16:00–17:30
Til staðar: Sunrit Niklasdóttir, Nelly Debes Christiansen, Marjun Danielsen, Vivi Davidsen, Ragnar Isaksen, Hallgerð L. Hansen og Høgni Warberg

Skúlastýrisfundur mikudagin 1. mai 2019

Skrá

1. Góðkenna seinastu fundarfrásøgn

2. Status viðv. ískoytinum um hjúnaskilnað

3. Status viðv keyp av uppvørpu og lørift

4. Tosa um garðdagin í juni

5. Finna fyrilestrarhaldara til felagsforeldrafundin í novembur

6. Status viðv ábøtum á fimleikarhøllina

7. Ymiskt

Att 1: Fundarfrásøgnin frá seinasta skúlastýrisfundi var góðkend, og verður í næstum løgd út á heimasíðu skúlans.

Att 2: Høgni hevði áðrenn fundin tosað við heilsufrøðingin um hetta og spurt seg fyri hjá øðrum skúlastjórum viðvíkjandi tilbúgvingarætlan í samband við hjúnaðarskilnað í øðrum skúlum. Vit gjørdu av, at vit í Kvívík ætla at víðarimenna eitt ískoyti um hjúnaðarskilnað til okkara tilbúgvingarætlan. Nelly hevur gjørt eitt uppskot til slíkt ískoyti. Men í tilgongdini lesa vit 2 skjøl til komandi fund, tað eina er núverandi tilbúgvingarætlan í Kvívíkar skúla og

hitt er sorgarætlan fyri skúlan í Eysturkommunu, har eisini hjúnaðarskilnaður stutt verður umrøtt.
Att 3: Í komandi viku fer Høgni at innheinta tilboð uppá uppvørpu, lørift og ljóðanlegg til amfi. Tá tilboðið er innkomið verður tað sent til kommununa við umsókn um játtan av pengum til hetta.

Att 4: Ætlanin er at hava garðdag í juni. Á okkara næsta skúlastýrisfundi fara vit at tosa nærri um, hvussu hesin dagur meiri nágreiniliga skal skipast. Tosað var um at byrja dagin seinni, tvs. áleið kl. 16, soleiðis at fleiri foreldur so væntandi náa at møta stundisliga til dagin.

Att 5: Avgjørt varð, at Høgni setir seg í samband við Elin Michelsen um at hava fyrilestur til felagsforeldrafundin, har evnið skal vera um skermnýtslu. Í ár verður felagsforeldrafundurin eftir ætlan mikukvøldið 13. november.

Att 6: Tað er onki meira hent viðvíkjandi málinum um ábøtur á fimleikarhøllina. Tað er bert innheintað eitt tilboð uppá at gera arbeiði, og tað er ikki nøktandi bert at innheinta eitt tilboð. Á fundinum varð gjørt vart við ónøgd um, at tað ikki er hent meir í samband við hetta málið!

Att 7: Vivi hevur sent teldupost viðvíkjandi teppinum í svimjihøllini við tí fyri eyga at teppi kemur at virka á fullgóðan hátt.
Komandi skúlastýrisfundur verður mikudagin 12. juni kl. 16.